## DAGSINS MEINING

# Rennur undan ábyrgd!

Tað er almenn hugsan, at almennir fjølmiðlar, útvarp og sjónvarp, skulu vera fullkomiliga óheftir av statsvaldinum ella landsstýrinum hjá okkum, og soleiðis er hugsanin í øllum demokratiskum londum. Hetta er eisini tað, ið tann nýggja lógin um kringvarp leggur upp til, men mentanevndin í Løgtinginum vil ikki at taka støðu til málið, tí tveir roknskaparkønir, landsgrannskoðarin og gjaldstovustjórin, tykjast ikki at skilja hesa fólkaræðiligu grundhugsan.

Uttan at greina uppskotið hjá Mentamálastýrinum út í æsir, so miðjar uppskotið ímóti at gera Útvarpið og Sjónvarpið til tveir sjálvstøðugar almennar stovnar. Millum landsstýrismannin í mentamálum og stovnarnar skal setast ein óheft nevnd og harafturat skulu stovnarnir virka sjálvstøðugir fíggjarliga. Tað merkir m.a. at teir skulu vera roknskaparliga leysir av landskassanum. Hetta nýtist samtundis ikki at forða teimum í at fáa almennan stuðul.

Sum er, er eingin nevnd millum landsstýrismannin í mentamálum, sum hevur ábyrgd av økinum, og stovnarnar. Henda bynaðarliga støða kann lættliga bera í sær, at tveir stovnar, ið liggja beinleiðis undir einum landsstýrismanni, ikki virka frælsir og politiskt óheftir. Teir kunnu heilt einfalt til eina og hvørja tíð koma undir politiskt trýst. Øll fjølmiðlafólk kenna hugtakið “innbygdur sensurur”, og hetta fyribrigdið kann gera seg galdandi, tá stutt er millum ein fjølmiðil og ein politiskan myndugleika.

Hetta er Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, og fyrisiting hansara í Mentamálastýrinum tilvitandi um. Tí hava tey latið uppskotið gera og lagt tað fram. Av somu orsøk skilja eisini tey flestu, sum hava áhuga fyri fjølmiðlum og fjølmiðlasiði, Torbjørn Jacobsen, tá hann heldur tað vera løgið og langt úti, at politikkararnir í mentanevndini ikki vilja viðgera innihaldið í uppskotinum, men lata seg tøla av áskoðanini hjá tveimum roknskaparkønum, ið tykjast vilja stýra lógararbeiði í kraft av sínum størvum. Er hetta ikki at vilja seta demokratiið til viks!

Við allari virðing fyri landsgrannskoðaranum, skal kortini spurnartekin setast við, um tað er rætt, at landsgrannskoðarin nærum einsamallur kann avgera spurningar, um hvat er rætt ella skeivt, ella taka støðu í løgfrøðiligum heimildarspurningum, sum natúrliga ikki liggja innan fyri hansara kompetansuøki. Í hesum sambandi eiga vit at minnast til, at løgtingið er yvir øllum, landsstýri, embætisverki og hervið eisini yvir landsgrannskoðaranum. Tað, sum løgtingið samtykkir, er lóg. Og løgtingið eigur ikki at lata seg stýra av øðrum fyrilitum enn tí, ið gagnar fólkaræði, landi og fólki.

Verður uppskotið sent Mentamálastýrinum aftur, merkir tað í fyrsta lagi, at eingin nýggjur stjóri verður settur í SvF í bræði, tí landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at nýggja nevndin skal seta stjóran, og í øðrum lagi skulkar mentanevndin sær undan politiskari ábyrgd í hesum fyri fólkaræði týdningarmikla máli!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fullveldisprofetarnir hava gjørt búskap til ein trúarspurning

**Atli Hansen**
*Gøtu 01.05.10*



Karstin Hansen, føroyskur landsstýrismaður í fíggjarmálum grynnur ikki í orðaskiftinum um búskaparspurningar í einum komandi fullveldi.

Kári Petersen, búskaparfrøðingur, hevði í fjør eina greinarøð, har hann lýsti sína fatan av teimum búskaparligu avleiðingunum av teimum ætlanum, sum henda landsstýrissamgongan hevur í hyggju at fremja.

Tá vóru merkiliga fáar viðmerkingar frá samgonguni til hesa framløgu. Onkrar hissini politiskar viðmerkingar, men ongar sakligar atfinningar, sum kundu vísa póstandunum hjá Kára Petersen aftur.

Nú er Kári Petersen eingin hvør sum helst í hesum samanhangi. Hann hevur í longri tíð starvast sum búskaparfrøðingur á fíggjardeildini í landsstýrinum og er nú – aftaná víðari útbúgving – settur aftur sum búskaparfrøðiligur medarbeiðari í okkara landsbanka.

Og nú eru so framløgurnar og niðurstøðurnar hjá Kára Petersen aftur at finna í bløðunum. Greiðar uppsetingar og greiðar grundgevingar, sum fólk hava møguleikar fyri at fylgja við í.

Og tá ið so Útvarp Føroya á middegi í dag fær okkara landsstýrismann í fíggjarmálum til fyri opnari mikrofon at gera sínar viðmerkingar, ja, so eru tær bert, at hetta er »politiskt«, »langt úti« og at »eitt rokniark kann so mangt«. Hvat var tað annað enn eitt rokniark, sum okkara umsiting í sínari tíð varð send runt í landinum við upp á landsins besta fyri at greiða frá fullveldisætlanum landsstýrisins?

Eg fari at loyva mær at siga, at tað er ótrúliga langt úti av okkara landsstýrismanni í fíggjarmálum, at svara einum av okkara mest seriøsu búsksparfrøðingum aftur á henda hátt. Ikki eitt orð um, hvar tað haltar, roknifeilir ella skeivar fortreytir. Nei, bert niðurgerandi viðmerkingar frá landsstýrismanninum, sum hann skuldi hildið seg ov góðan til. Men hetta er helst einasta lóður, hann hevur í skjáttuni og tá hevði tað klætt honum betri einki at sagt. Ikki eitt einasta sakligt mótargument.

Karstin Hansen saman við sínum floksfeløgum byggir sína búskapartrúgv á tilmælir frá dulnevndum embætismonnum í hansara egnu umsiting. Tí fyri tjóðveldisflokkin serliga er alt viðvíkjandi okkara búskapi í einum framtíðar fullveldi ein trúarpsurningur. Høgni Hoydal legði út við at siga, at hann trúi, at tað kom ein dynamikkur í búskapin tá ið vit fóru at fáa fullveldi. Hann trúi, at hetta fekk føroyingar til at taka seg so mikið saman, at tað gav eina størri úrtøku. Ja, tað kann helst gerast neyðugt, um vit fylgja døminum hjá Kára Petersen.

Nei, landsstýrismaðurin í fíggjarmálum átti at verið betri ílatin tá ið hann skal vísa einari tílíkari framløgu aftur. Annars skuldi hann sent onkran annan í sín stað. Tað ber ikki til at svara tílíkum væl undirbygdu frágreiðingum bert við at endurtaka nakrar innantómar máliskur. Tað er ein naiv niðurgering av lurtarum og lesarum. Fólk roknar við meira góðsi enn hesum frá einum landsstýrismanni.

Vit síggja fram til at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer at sundurgreina framløguna hjá Kára Petersen og vísa okkum á, hvar Kári Petersen fer skeivur.

Um hetta fer at eydnast honum, kann tað vera, at hann vinnur onkra sál afturat fyri sínum fullveldisætlanum, men sum er og við teimum nevndu grundgevingunum, eigur álitið á henda mann sum ein oddafisk at vera ógvuliga avmarkað.

Ein landsstýrismaður í fíggjarmálum má kunna argumentera á hægri støði enn lurtarnir her vóru vitnir til.

# Ársmøti í Nesvík

Jesus Kristus frelsari heimsins. Undir hesi yvirskrift bjóðar Heimamissiónin øllum vælkomnum til Ársmøtið í Nesvík. Ársmøtið verður í dýrabiðidagshalguni komandi vikuskifti frá 10. til 13. maj.

Tað verður mangt og fjølbroytt innihald á skránni hesar dagarnar — bæði fyri børn, ung og vaksin. Kór og sangbólkar koma at taka lut við sangi og vitnisburði og talað verður um besta vinin av øllum, Jesus Kristus, frelsara heimsins.

Byrjað verður við inngangsgudstænastu, hósdagin, kl. 19.30 við Norðskála kirkju, og hildið verður fram til sunnudagin, har endað verður við møti kl. 18.00 í Leguhúsinum í Nesvík. Nógv áhugavert og viðkomandi verður at hoyra allar dagarnar.

Fríggjadagurin er allur settur til tað yngra ættarliðið við evnum og pallborðsorðaskifti um andaliga arbeiðið millum børn í dag. Frelsa til eitt nýtt ættarlið er yvirskriftin yvir møtið fríggjakvøldið.

Leygarmorgunin er evnið: Heimurin frelstur við honum, har víst verður á týdingin av at bera gleðiboðskapin út til onnur fólkasløg eisini.

Seinnapartin er sum vant formansfrágreiðing, arbeiðsfrágeiðing og fíggjarfrágreiðing umframt orðaskifti um arbeiðið. Hesa løtuna verður høvi at taka upp og viðgera arbeiðið í Heimamissiónini.

Leygarkvøldið og sunnudagin verða so aftur møti í Nesvík og gudstænastur í kirkjunum her rundan um.

Í skránni er eisini ein áhugaverd ungdómsskrá, har ungdómurin skipar fyri við sangi, lovsangi, vitnisburði, café, kórum, sangbólkum og drama-framsýning.

Eisini er fjølbroytt barnaskrá við bíbliusøgu, søgu, sangi, spølum, filmum, kappingum, familjumøti, barnakóri o.ø. Tað verður eisini høvi at útvega sær góðan kristiligan lesnað frá forlagnum, sum vísir fram tilfar til allar aldursbólkar.

Tað er alt gott at fáa hjá øllum. Men fyri at tryggja tær innivist og mat undir Ársmøtinum, mást tú melda teg til í góðari tíð og í øllum førum í seinasta lagi, mánadagin, 7. maj. Øll eru hjartaliga vælkomin á Ársmøtið í Nesvík.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Ein viðmerking til kringvarpsrokið

**Jógvan Jespersen**


*Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, og settur sjónvarpsstjóri, er ørkymlaður av løgtinginum*

Mikudagin kom umsíðir álitið frá mentanarnevndini hjá løgtinginum í málinum til broytingar í kringvarpslógini, og tá tú lesur álitið, so er tað satt at siga hugstoytt at ásanna, at prinsipielli spurningurin um viðurskiftini millum politisku myndugleikarnar og almennu fjølmiðlarnar næstan ongan politiskan áhuga hevur í Føroyum.

Tú spyrt teg sjálvan: er tað veruliga so, at vit skulu siga okkara samstarvs-feløgum í teimum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, at í Føroyum er so at siga full politisk semja um, at almennu fjølmiðlarnir skulu vera ein partur av almennu umsitingini. Tú skalt heilt til eystureuropa fyri at finna líknandi skipanir, og har vórðu tær flestu annars vrakaðar fyrst í 90-árunum.

ÚF hevur kanska ein part av skylduni av, at hetta uppskot er lagt fyri tingið. Eftir okkara bestu sannføring mettu vit ikki at fíggjarmálastýrið og gjaldstovan vildu fylgja ásetingunum í kingvarpslógini, sum kom í gildi í 1998. Tá landsgrannskoðanin heldur ikki helt, at hetta var nakrar trupulleiki, mettu vit tað sum okkara skyldu at mæla stýrinum til, at lógin varð endurskoðað, so samsvar var millum lóg og umsiting. Tað ber heilt einfalt ikki til at umsita eftir eini lóg, sum bara er vegleiðandi í grundleggjandi spurningum.

Nú álitið kemur fram, dylir meirilutin í mentanarnevndini ikki fyri, at tað eru viðmerkingarnar frá landsgrannskoðaranum, stjóranum á gjaldstovuni og Fíggjarmálastýrinum, sum eru beinleiðis orsøkin til, at nevndin mælir til at fella uppskotið. Á heimasíðuni hjá løgtinginum hevur borið til at fylgja við viðgerðini í mentanarnevndini, og tað eru fleiri viðmerkingar, sum vekja undran. ÚF hevur síðan miðskeiðis í 90-árunum víst á tað prinsipiella í málinum, og allir partar eru fullgreiðir yvir, hvat málið snýr seg um, hóast tú í støðum fært fatan av, at so er ikki.

Landsgrannskoðarin sigur í sínum notati, at sambært uppskotinum til broytingar í kringvarpslógini verða tveir juridiskir "bastardar" stovnaðir, og á týðandi økjum setir lógaruppskotið til viks grundleggjandi áestingar í stýrisskipanarlógini, játtanarskipanini, roknskapar- og grannskoðaralógini. Er hetta rætt, so vórðu "bastardarnir" væl stovnaðir við lógini frá 1998, og so mugu grundleggjandi trupulleikar vera í umsitingini, sum eiga at verða tiknir til viðgerðar.

Hesir myndugleikarnir hava havt nógv høvi til at gera løgtingið vart við sína støðu. Hesi høvi hava teir ikki brúkt. Tað, sum undrar, er, at tú umsitingarliga kanst broyta so grundleggjandi skipanir, uttan tað verður gjørt eftir eina greiða politiska støðutakan. Men er tað løgtingsins vilji, so fær tað jú ikki verið øðrvísi.

Í 1997 varð nevnd sett at fyrireika uppskot til nýggja lóggávu fyri kringvarpsøkið í Føroyum. Undirritaði luttók í hesum nevndararbeiði sum umboð fyri ÚF. Nevndin legði stóra orku í hetta arbeiðið, og varð m.a. lóggávan í okkara grannalondum gjølla kannað. Lógaruppskotið varð serliga gjørt við fyrimynd í donsku og grønlendsku lóggávuni.

Nevndin brúkti nógva tíð til at koma fram til eitt uppskot til eina skipan við javnvág millum tað frælsið, sum stovnar av hesum slagnum eiga at hava í okkara samfelagsskipan og tað eftirlit, ið teir so ella so skulu vera undir.

Tá var tilgongdin við at taka fíggjarætlanina hjá ÚF og SvF við aftur á fíggjarlógina sum játtan til landsstovn byrjað, uttan at tað tá varð fingin greiða á, hvussu hetta játtanarslagið skuldi skipast, men sjónarmiðini hjá gjaldstovuni og landsgrannskoðanini vórðu kend.

Nevndin umrøddi hesi viðurskifti gjølla, og í uppskotinum, sum nevndin legði fyri landsstýrið, varð mælt til, at tann parturin av virkseminum hjá stovnunum, sum verður fíggjaður við útvarpsgjaldi, lýsingum og spæli, ikki skuldi játtast á fíggjarlógini, og harvið heldur ikki takast við í landsroknskapin, meðan fíggjarstøðan hjá stovnunum sum higartil varð skrásett í fíggjarstøðuni hjá landinum. Tá talan var um at seta skott millum almennu fjølmiðlarnar og politiska myndugleikan varð lógin meira avmarkandi enn samsvarandi lóggáva í okkara grannalondum.

Eg veit ikki um, at tað í viðgerðini í lógardeildini hjá landsstýrinum, í umstingini hjá løgtinginum, ella í løgtingsviðgerðini av uppskotinum til kringvarpslóg, varð sett spurnartekin við, at lógin var grundleggjandi í stríð við stýrisskipanarlógina, játtanarskipanina, og roknskapar- og grannskoðanarlógina.

Er tað so, at tað er støðan, so mást tú undrast yvir, at avvarandi myndugleikar ikki hava nýtt høvi til fyrr gera vart við seg í einum so álvarsligum máli.

Fíggjarmálastýrið hevði fyrsta møguleikan. Stutt eftir at kringvarpslógin varð komin í gildi, varð fíggjarlógin fyri 1999 løgd fyri tingið. Har var øll fíggjarætlanin hjá ÚF og SvF tikin við sum játtan til landsstovn. Har kundi Fíggjarmálastýrið gjørt vart við, at fíggjarlógin varð løgd fram soleiðis, tí løgtingið fyri eitt fakøki hevði samtykt eina lóg, sum var í stríð við alla grundleggjandi lóggávu í Føroyum. Men tað hendi ikki.

Tá roknskapurin hjá ÚF fyri 1998 varð til viðgerðar í landsgrannskoðanini førdu vit eisini hesi sjónarmið fram. Løgtingsgrannskoðararnir svaraðu okkum: "Er talan um ein landsstovn, er tað í stríð við stýrisskipanarlógina, at virksemið ikki verður tikið við á fíggjarlógina. Vísast kann á, at nú løgtingið hevur samtykt fíggjarlógina fyri 1999 og 2000, er hetta eisini staðfest av løgtinginum". Eg veit ikki, um allir løgtingsmenn vóru greiðir yvir, at tað var soleiðis, avgerðin um framtíðar fíggjarliga tilknýtið hjá almennu fjølmiðlunum varð tikin. Ongin hevði farið illa, um løgtingsgrannskoðararnir søgdu frá hesum, og gjørdu vart við, at kringvarpslógin átti at verið tillagað grundleggjandi føroyskari lóggávu. Ella bara søgdu, at tað eisini vóru onnur sjónarmið um hesi viðurskifti. Men tað gjørdu teir ikki.

Raksturin hjá ÚF hevur ligið uttanfyri landskassan, stovnurin hevur havt egnan roknskap, og fíggjarstøðan hevur verið tikin við í landsroknskapin. Í fjør varð roknskapurin lagdur inn í landsroknskapin, og stovnarnir skulu hvønn mánað senda gjaldstovuni roknskapartøl. Eisini tá vístu vit á tað, sum er nevnt oman fyri, og bóðu um tænastuboð um at umsita soleiðis. Tey fingu vit, og so kom tað upp á pláss.

ÚF hevur eisini víst á ein annan prinsipiellan spurning. Øll árini hevur stovnurin kunna flutt avlop ella hall til næsta roknskaparár, men í fíggjarlógini fyri 2000 var C-átekningin strikað, sum gevur heimild til at flyta til næsta roknskaparár. Í grein 7 í kringvarpslógini er ásett, at inntøkur hjá ÚF bert kunnu brúkast til endamál hjá ÚF. Í góðari tíð vístu vit á, at hetta fór at vera ein trupulleiki, um ÚF fekk eitt rakstraravlop í 2000. Vit høvdu eitt lítið rakstraravlop í 2000. Spurningurin er so, hvat skal gerast við tað, tá hetta eru inntøkur í rakstrarárinum 2000, ÚF ikki kann flyta avlopið til næsta ár, og tað bert kann brúkast til endamál hjá ÚF.

Eg nevndi í inngangínum, at ÚF kanska hevur eitt sindur av skylduni av, at uppskotið til broytingar í kringvarpslógini er lagt fyri tingið, tí vit mæltu til at broyta lógina, tá vit vóru sannførd um, at lógin og umsitingarpraksis ikki samsvaraðu. Tað mugu vit bara læra okkum at liva við og góðtaka, at støðan er, sum hon er.

Eftir stendur so spurningurin um, hví tað ikki ber til í føroyskum politikki at skapa breiðar semjur um viðurskiftini hjá almennu fjølmiðlunum. Tað ber til í flestu londunum, sum vit helst vilja samanbera okkum við.

